# Okkara maður



**Carl Eli Nolsøe Samuelsen, sum vann FM eftir umdyst við Martin Poulsen, ið hevur verið meistari seinastu árini, heldur seg hava fingið íblásturin til telvingina frá mammubeiggjunum og pápanum**

TALVMEISTARIN
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Páskaaftan varð eitt nýtt navn lagt afturat frammanundan ikki so stutta listanum, sum vísir føroyameistarar í talvi fyri einstaklingar. Nýggjur meistari er Carl Eli Nolsøe Samuelsen. Hann er maðurin hjá Sosialinum. Tað skal skiljast á tann hátt, at hann seinastu árini so at siga hvørja viku hevur skrivað um talv í blaðnum.

Men tað er ikki í Sosialinum, at meistarin, sum 7. apríl verður 26 ár, hevur fingið íblástur til telvingina. Hann lærdi mannagongdina í 1987, og síðani í 1990 hevur hann verið bitin av talvi og telving.

- Eg havi telvað nógv ímóti pápa mínum, sum eitur Sjúrður, og so hava mammubeiggjarnir, Rani og Eyðun, stimbrað meg nógv, sigur nýggi meistarin, tá ið vit hava heilsað honum og ynskt honum tillukku við nýggja heitinum. Mamma Carl Eli er Dora, næstelsta systurin hjá Rana og Eyðuni.

Meistaraskapurin ber í sær, at Carl Eli gongur í fótasporunum hjá mammubeiggjunum, sum báðir hava verið meistarar, og tey seinnu árini hevur hann fingið góða venjing í føroyska talvfelagnum í Keypmannahavn, sum luttekur í bestu røðini í donsku landskappingini. Í vetur luttók hann í FM kappingini í talvi. Hann hevur telvað nógv í Havnar Telvingarfelag, men í ár umboðaði hann tvær ferðir Vestmanna Talvfelag.

*Hevði tú roknað við, at tú hesa ferð skuldi gerast meistari?*

- Eg hevði vónað tað, men eg haldi ikki, at eg roknaði við tí. Martin Poulsen og Hans Kristian Simonsen høvdu hægstu styrkistølini, og teir vóru favorittar. Men fram ímóti endanum á kappingini lagaði tað seg soleiðis, at møguleikin var har.

*Nær sást tú møguleikan fyri, at tú skuldi vinna?*

- Lyklatalvið var í 8. og næstsíðsta umfarinum. Tá hevði eg hvítt ímóti Eyðuni. Hann fekk eina finnu frá mær, men annar riddarin hjá honum varð rættuliga avmarkaður, og at enda eydnaðist tað at fáa alt stigið frá honum. Í síðsta umfarinum hevði eg aftur hvítt, og talvið ímóti Torkili Nielsen gav mær sjálvsálit undan umdystinum ímóti Martini.

## Undir somu lon

Meðan kappast varð um meistaraskapin á Oyrabakka, helt Nolsøe talv klanurin til í leigaðum húsum á Eiði. Rani, Eyðun og Carl Eli hingu yvir talvborðinum um kvøldarnar og morgnarnar, áðrenn teir eftir døgurða koyrdu nakrar minuttir suður til FM borðini.

*Var tað ikki undarligt at búgva saman við teimum, sum tú kappaðist við?*

- Vit hava fleiri ferðir búð saman, tá ið vit hava kappast um FM fyri einstaklingar, og vit hava havt stórað gleði av at vera so nógv saman, og í talvhøpi hevur hetta givið mær nógv. Rani og Eyðun hittust ikki í kappingini hesa ferð, og tað gjørdu Rani og eg heldur ikki. Tá ið Eyðun og eg skuldu hittast fríggjadagin, var stemningurin ikki akkurát tann sami, sum hann hevði verið frammanundan. Kvøldið fyri og tann morgunin vóru vit sjáldan í stovuni í senn, og eg haldi ikki, at nakar, sum fylgdi við í talvinum okkara millum, kann siga annað, enn at vit báðir ógvuliga fegnir vildu vinna og harvið varðveita møguleikan fyri meistaraskapinum.

## Umdysturin

Tá ið níggjunda og seinasta umfarið var av, var tað greitt, at meistarin seinastu árini, Martin Poulsen, og Carl Eli Nolsøe Samuelsen høvdu 6,5 stig í part, og at tað tískil var neyðugt við umdysti. Fyrst høvdu teir 25 minuttir í part og 10 sekund til hvønn leikin í tveimum kviktalvum, sum tað verður nevnt. Martin hevði svart í fyrra talvinum, og hann vann.

- Eg søplaði góða støðu burtur, og tí stóð tað ikki so væl til, tá ið eg í seinna talvinum skuldi hava svart. Í tí talvinum hevði Martin væl betri støðu. Vit vóru báðir kroystir av tíðini, og mát hóttan hevði við sær, at eg slapp burturúr tronganum og vann, greiðir nýggi meistarin frá.

Carl Eli tryggjaði sær meistaraskapin í suddendeath talvi, sum tað verður nevnt. Í sovornum talvi eigur hvítur seks minuttir, og svartur eigur fimm minuttir til talvið. Hvítur skal vinna. Um tað endar javnt, so hevur svartur vunnið. Martin vann lutakastið, og hann valdi svarta fólkið. Tíðarneyðin var stór, og pinnurin datt hjá Martini, men eigin, sum fylgdi við, ivaðist í, at støðan hjá Carl Eli var væl betri, enn hon var hjá meistaranum seinastu árini.

## Taktiska og sinniliga styrki

Carl Eli vil ikki siga so nógv um sínar styrkir og veikleikar sum telvari. Tá ið við siga honum tað, sum aðrir telvarar hava sagt um eyðkennini hjá honum, so er hann ikki so ósamdur.

Carl Eli verður ikki mettur at hava hugin og orkuna, sum aðrir - eitt nú Hans Kristian Simonsen og Martin Poulsen - hava at sita yvir bókunum og borð-